# Hugnaløta fyri mæta listarmanninum Ingálvi av Reyni

HUGNALØTA
*Lagt til rættis og myndir: Jan Müller*

Týskvøldið varð minnilig løta í hølunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar á Kongabrúnni. Eingin minni enn mæti listamaðurin Ingálvur av Reyni vitjaði hetta kvøldið. Hann var boðin til lítla hátíðarløtu í sambandi við, at Tryggingarfelagið hevði keypt málningin "Gjøgnum tíð og rúmdir", sum Ingálvur málaði í 2002. Hesin risi av einum málningi hongur nú á vegginum í tryggingarhølunum við síðuna av "lítla beiggja", sum fyritøkan keypti frá sama Ingálvi í 1947. Hesa sera hátíðarligu løtuna, har eisini familjan hjá Ingálvi varð hjástødd umframt starvsfólk í Tryggingini, sang og setti Dupultkvartettin í Ebenezer sín serstaka dám á. Stjórin í Tryggingarfelagnum, Gunnar í Liða takkaði listarmanninum fyri at hava tikið av tilboðnum at vera við til hugnaløtuna. Hann segði m.a.

- Góði Ingálvur. Tað er mær ein stór gleði, at tú vildi vísa okkum tann heiður, at koma oman á Tryggingina í dag. Stytsti dagur er í dag. Myrkt og illfýsið úti, men eg vóni at hetta verður ein fløvandi løta.

Sum listarmann eru tað nógv ið duga betur at lýsa títt lívsverk enn eg, men pápi tín Jens av Reyni var fyrsti stjóri her í felagnum - hann var stjóri frá 1940 til 1948 - so vit føla, at tú hevur eitt serligt tilknýti til Tryggingina, og tí eri eg sera fegin um, at Tryggingin herfyri ognaði sær myndina sum tú málaði í 2002 og gav heitið "Gjøgnum tíð og rúmdir."

Herfyri gjørdist mær greitt, at vit her á stovninum eisini eiga ein lítlan málning sum tú málaði í 1947, og sum hevur eitt heilt serligt tilknýti til okkara felag. Eg eri glaður um, at tú gavst tær tíð til at greiða okkum frá hesari søguni, og eisini at tú við tínum egnum orðum skrivaði um bakgrundina fyri tí nýggja málninginum.


*Ein fegin Ingálvur fekk blómur á hugnaløtuni í Tryggingini*

Títt lívsverk hevur varandi virði, og vil vera ein støðug eggjan til okkum sum hava tann framíhjárætt at kunna arbeiða í einum umhvørvi har fleiri av tínum málningum hanga.

Síðani las hann upp tað, sum Ingálvur við egnum orðum skrivaði um nýggja málningin sum hann sum sagt gav heitið "Gjøgnum tíð og rúmdir." Og eftir tað lat hann yrkingina "Gjøgnum tíð og rúmdir", sum hann samtíðis helt vera eina fantastiska yrking.

Og Gunnar í Liða helt fram:

– Við síðuna av nýggja málninginum hava vit hongt ein lítlan málning, sum tú sum sagt málaði í 1947, og sum hevur eitt serligt tilknýti til Tryggingina. Eg fari at lata teg við egnum orðum, sum tú greiddi okkum frá á sera hugnaligari løtu heima hjá tær og Elsu herfyri. Ímyndið tykkum at vit sita og fáa ein kaffimunn í stovuni hjá Elsu og Ingálvi meðan prátað verður. Tit hoyra klirr av kaffikoppum, so umstøðurnar vóru heimligar. Eftir tað var bandupptøkan avspæld fyri teimum umleið 100 fólkunum, sum vóru hjástødd.

At enda takkaði stjóprin Ingálvi fyri alt tað sum hann hevur givið okkum øllum, ynskti honum hjartaliga tillukku við 84 ára føðingardegnum ið var leygardagin og ynskti honum og hansara eini gleðilig jól.

# Dupultkvartettin í Ebenezer sang fyri Ingálvi

**– Takk fyri íblástur - ígjøgnum sangin og listina. Men ikki minst: takk fyri tykkara fyridømi á tí kanska mest grundleggjandi økinum av øllum … sum menniskja, sum medmenniskja segði Alexander Samuelsen, tá Dupultkvartettin í Ebenezer heilsaði Elsu og Ingálvi í bygninginum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar á Kongabrúnni týskvøldið**


*Dupultkvartettin í Ebenezer sett sín serstaka dám á hugnaløtuna.*

SAMKOMA

Tá Tryggingarfelagið Føroyar skipaði fyri hugnaløtu fyri Ingálvi av Reyni í hølunum á Kongabrúnni týskvøldið sang Dupultkvartettin í Ebenezer fyri Ingálvi. Alexander Samuelsen stjórnaði og greiddi frá millum sangirnar. Hann segði m.a.

- Tá vit vórðu spurdir, um vit kundu syngja nakrar sangir í sambandi við jólaløtuna her - og vit eisini fingu at vita, at Ingálvur av Reyni fór at vera hjástaddur - helt onkur fyri: ’Kunnu vit siga nei, tá tað ræður um Ingálv?’ Tað er okkum ein fragd at syngja her í kvøld. Sangirnir, sum vit hava valt, knýta seg á ein ella annan hátt til Ingálv. Umframt málningalistina, hevur Ingálvur ríkað okkum við sangrødd síni. Sangir sum ’Gangi eg um heiðar fjøll og dalar’, ’Vaknaður vársins songur’, ’Er Jesus nær’ - fyri at nevna nakrar - munnu flestu okkara kenna! Yndisligir sálmar og sangir! Miðskeiðis í áttatiárunum sang Ingálvur nakrar sangir saman við okkum í Dupultkvartettini, og ein teirra var hesin:

**‘Við krossin tín, á Jesus’**

Í áttatiárunum var Zacharias Hammer - sum hann eisini er í dag - undangongumaður í sambandi við sjónvarpssendingar. Og hesi árini vóru fleiri ferðir boð eftir Dupultkvartettini. Eitt árið vórðu jólaupptøkur gjørdar í hellinum omanfyri brand-støðina við Oyggjarvegin, og eitt árið ’Frammi við Gjónna’. Og bæði árini var Ingálvur við. Eg minnist, hvussu Ingálvur fylti hellið, tá hann sang solo í hesum sanginum:

**‘Tú lítli staður Betlehem’**

Ingálvur dugir so nógv annað enn at mála og at syngja. Hann dugir eisini at skriva og at týða. Í ’Songbók Guds Fólks’ er ein - eftir mínum tykki - frálík týðing hjá Ingálvi, har hann í einum versi sigur:

*Drottur ævinleikans mikil,*
*hann, ið skapti himnafør,*
*einsamur á fold hann gekk,*
*so fremmandur á egnu jørð.*
*Saknur, sorg og pína nívdu*
*hjarta hans, og heimsins neyð*
*bar hann, og á krossi bøtti*
*vára synd við skemdardeyð.*

Tað er hugaligt at kenna listarligu gávurnar hjá Elsu og Ingálvi aftur í børnunum.

Øll duga tey at syngja og mála, og hjá fleiri liggur ræði fyri - bæði at skriva, yrkja og týða. Jólaaftan í fjør týddi Árni, hendan sangin úr íslendskum:

**’Náttin var so føgur ein’**

Vit fara at enda nú, men áðrenn ynskja vit í ’Dupultkvartettini í Ebenezer’ øllum eini góð og gleðilig jól og signað komandi ár. Vit takka eisini fyri høvi at syngja her. Vit fara at takka tær, Ingálvi, fyri sanginar, tú sang saman við okkum. Persónliga loyvi eg mær eisini at takka tær og Elsu fyri ógloymandi løtur í heimi tykkara ígjøgnum árini. Takk fyri íblástur - ígjøgnum sangin og listina. Men ikki minst: takk fyri tykkara fyridømi á tí kanska mest grund-leggjandi økinum av øllum … sum menniskja, sum med-menniskja!

Ein av sangunum, sum vit í gjøgnum árini hava sungið ferð eftir ferð, og sum hvørja ferð minnir okkum á, tá Ingálvur sang hann saman við okkum, er hesin: ’Nu andar suðrið’